# 18 ára føðingardag á Ayers Rock

**18 ára gamla Kristina Poulsen úr Klaksvík er júst afturkomin úr Tasmania, har hon hevur verið skiftisnæmingur í eitt ár. Hon er nógv upplivilsir ríkari og heldur, at hon hevði kunnað búð á Tasmania í eina tíð, men ikki altíð**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*


*18 ára gamla Kristina Poulsen úr Klaksvík hevur verið skiftisnæmingur í Tasmania í eitt ár. Hon kom heimaftur fyri tveimum vikum síðani*

**Klaksvík:** Kristina er ein blíð og fryntilig, ung genta, sum dugir væl at greiða frá. Við sær í taskuni hevur hon eina ørgrynnu av myndum frá Tasmania, sum hon vísir fram, og hvørja ferð hon sigur okkurt navn ella annað á enskum hoyrist tann serstaka avstralska dialektin aftur.

Tann 1. juli í fjør fór Kristina úr Føroyum til Danmarkar, har hon møttist við øllum hinum, sum eisini vóru so heppin at sleppa út í heim sum skiftisnæmingar. Haðani gekk leiðin til Singapore, og so skiltust tey. Leiðin hjá Kristinu gekk til býin Launceston á Tasmania, har hon skuldi búgva tað komandi árið.

– Tað var ikki gott veður, tá eg kom niður. Juli er ein tann kaldasti mánaðurin har niðri, og tey hava ikki sentralvarma, so ta fyrstu tíðina var eg sera køld. Tá komu tann føroyska troyggjan og hosurnar til sín rætt, greiðir hon flennandi frá.

– Kuldin var bítandi, sigur hon, og tað var torført at venja seg við.

Henni longdist illa heim ta fyrstu tíðina, tí alt var nýtt og ókent. Men hon hevur lætt við at koma í samband við fólk, so tað tók ikki so langa tíð hjá henni at venja seg við sítt nýggja heim og land.

Hon greiðir frá eini rúgvu av upplivilsum, sum henni hevur verið fyri, men hon leggur út við at siga, at eitt tað besta upplivilsi á túrinum var, tá hon saman við øllum hinum skiftisnæmingunum í Avstralia fór ein túr kring landið. Tey vitjaðu mong forkunnug støð og upplivdu nógv.

– Tann dagin eg fylti 18, 14. apríl, klintraði eg upp á Ayers Rock í Avstralia, og har sungu tey til lukku til tín fyri mær, og eg lat eitt kort upp frá míni familju, sigur Kristina, meðan hon vísir myndir frá klettinum. Og tað er ikki ein klettur, sum vit kenna teir. Ayers Rock stendur mitt í ongamannalandi í Avstralia, og onki er rundanum, uttan fjøll langt burturi og sandur, steinar og grús. Kristina sigur, at tað var ein øðrvísi føðingardagur, sum hon ongantíð fer at gloyma.


*Hendan klettin klintraði Kristina saman við sínum vinfólkum uppá, tann dagin hon fylti 18 ár*

Hon sigur, at tað var ongin, sum kendi nakað til Føroyar harniðri, og tey spurdu hana nógvar løgnar spurningar.

– Tey spurdu, um vit hava el, teldur og vegir til dømis. Tað var ikki frítt, at eg hevði hug at flenna at teirra spurningum viðhvørt, tí teir kundu vera rættuliga býttir, sigur hon smílandi. Og heldur fram, at við tíðini gjørdist tað ein vani at siga, hvar hon var frá, og hvar Føroyar liggja. Hon segði tað bara altíð í einum setningi, so slapp hon undan teimum somu spurningunum.

## Lítladidda

Kristina kom at búgva hjá eini familju, har fýra synir vóru. Teir vóru allir fluttir út, so Kristina bleiv lítla diddan í húsinum. Pápin var lærari og mamman sjúkrasystur. Kristina kom at ganga í einum privatskúla við 600 næmingum í tí elsta flokkinum, sum er tann tólvti. Hon var tann fyrsti skiftisnæmingurin á hesum skúlanum, so tey vóru so at siga líka spent sum hon. Tá næmingarnir eru lidnir við hetta skúlaárið, kunnu tey fara víðari til hægri lesnað, og eru sostatt á sama støði sum miðnámsútbúgvingin í Føroyum.

Henni dámdi sera væl á skúlanum, og tað var ikki torført hjá henni at læra, tí enskt er ikki nakar stórvegis trupulleiki hjá henni. Hon hevði tvær ymiskar enskar lærugreinar, onnur var enskt mál og hin enskar bókmentir. So hevði hon eisini søgu. Hon var í skúla hvønn dag frá klokkan 9 til gott 3 seinnapartin, men ímillum hevði hon nógvar frítímar.

Summarfrítíðin vardi frá novembur til februar. Og tá bleiv veðrið heilt gott, oghitin var nógvur.

– Tá tað var heitast, lá tað upp móti 40 stigum, men vanliga var tað mest millum 20 og 30 stig, so tað var ordiliga lekkurt, sigur Kristina. Og hóast hon ikki er so sólbrend í andlitinum longur, so sást á ørmunum hjá henni, at hon einaferð hevur fingið sera nógva sól.

Í summarfrítíðini fór hon saman við øðrum skiftisnæmingum har á leið á eina rundferð kring Avstralia. Tað dámdi henni sera væl. Hon upplivdi mangt og hvat. Men eitt tað fyrsta hon byrjar at tosa um, tá hon greiðir frá hesum túrinum er, at tað eru nógvir rúsdrekkatrupulleikar millum upprunafólkaslagið í Avstralia.

– Tey sótu allastaðni, og tey drukku allatíðina. Sjálvandi ikki allir, men meginparturin av teimum. Uttanfyri handlar og rúsdrekkasølur sótu tey og tømdu eina fløsku fyri og aðra eftir, greiðir hon frá.

Á hesum túrinum upplivdi hon nógv, og hon kom víða um. Hon slapp at snorkla, at sova undir stjørnunum í eina nátt, surfa, ríða kamel og mangt, mangt annað.

Hon greiðir frá, at á Tasmania vóru ikki so nógv flogkykt, men tað var annað lív í Avstralia.

– Har vóru so nógvar flugur, og tær settu seg á teg allastaðni, har væta er. Lat tú munnin upp, so flugu tær inn í munnin, tær settu seg á eygnalokini og fóru næstan ikki vekk aftur, sjálvt um tú turkaði tær vekk við hondini. Ótrúliga nærgangandi flugur, má eg siga, greiðir hon flennandi frá. Hesar flugurnar vóru tó ikki allastaðni í Avstralia.

## Jól á hásumri

Á Tasmania er heitast, tá tað er kaldast í Føroyum. Og hetta slapp veruliga at standa sína roynd, tá Kristina skuldi halda jól harniðri.

– Eg royndi at heingja prýði upp ymsastaðni inni, tí tey vóru givin við hesum, tá synirnir vóru blivnir vaksnir. Sjálvan jólaaftan vóru 22 stig úti í havanum, og tey grillaðu kyllingapylsur og bringur og ótu salat afturvið. Kristina hevði tó gjørt rís a la mande, so okkurt heimligt var við.

Tá fór longsulin aftur at gera vart við seg hjá henni, og táhon tosaði heim við mammu sína og hoyrdi, at tey fóru at eta tað vanliga, also dunnu við øllum góðum og so at pakka upp, ja, tá longdist henni illa heim. Men í dag er hon tó fegin um at hava roynt at hildið jól á ein so øðrvísi hátt.

Kristina heldur, at hetta at royna eitt skúlaár úti í heimi er við til at menna ein nógv. Hon er sera fegin um, at hon fekk hendan møguleikan, tí vinarbond eru knýtt fyri lívið.

– Eg fari niður aftur í brúdleyp hjá einum av beiggjunum hjá mær har niðri, og tað gleði eg meg til. Eg kundi væl búð á Tasmania, men bara í eina tíð. Óansæð hvar eg so fari, so fari eg altíð at koma heimaftur til Føroyar, sigur Kristina Poulsen, sum fer at royna seg á arbeiðsmarknaðinum í eitt ár, áðrenn hon fer á HF.


*– Vinarbond verða knýtt fyri lívið, og tað var torført at skula heimaftur, tí eg bæði gleddi meg og var kedd um at skula fara haðani, sigur Kristina*



UNITED seafood

## Góðskumeting

Søkt verður eftir einum fólki til góðskumeting av ráfiski og annað fyrifallandi arbeiði. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Føroya Fiskavirking Vestmanna**
Postboks 118, Durita á Heygum
telefonnr. 424655

Søkt verður eftir dugnaligum rørsmiðjum, ella øðrum handverkarum at byrja sum skjótast

Sosialurin 341800

**rør**-tænastan
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión
tlf./fax: +298 31 91 22 · farttlf.: +298 21 91 22

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3629
**Navn:** Sp/f Vípan
**Adressa:** Niðan Horn 2, 700 Klaksvík
**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 01.07.2003
**Viðtøkudato:** 01.07.2003
**Kapitalur:** Kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 100.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Jastrid Sofía Gullaksen, Niðan Horn 2, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Jastrid Sofía Gullaksen, Niðan Horn 2, 700 Klaksvík og Símun Gullaksen, Niðan Horn 2, 700 Klaksvík
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Sp/f Agnar á Dul, Gerðagøta 31, 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.07.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er heil- og smásøla, umboðan, útleiðan, útflutningur v.m.

*Skráseting Føroya tann 7. juli 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3626
**Navn:** Sp/f Forritan
**Adressa:** Víkavegur 4, 700 Klaksvík
**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 01.07.2003
**Viðtøkudato:** 01.07.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 70.000,00 kontant og kr. 10.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Heini Justinussen, Víkavegur 4, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Heini Justinussen, Víkavegur 4, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** P/F Føroyabók, Vágstún 2, 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.07.2003 - 31.12.2004.
**Endamál:** Endamál felagsins er forritan, handil, umboðan og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 7. juli 2003*

*Kristin Balle*

veitst tú ikki tað?

www.sosialurin.fo

## Starvsfólk til køkin á Læraraskúlanum

Lýst verður eftir starvsfólki til køkin á Føroya Læraraskúla.

Uppgávan er at vera kokkinum til hjálpar í dagliga arbeiðinum í matstovuni.

Umframt vanligt matstovuarbeiði, sum at standa við kassan, at vaska upp og at halda køkin og umhvørvið í matstovuni reint og hugnaligt, er ein spennandi avbjóðing at vera við til, saman við kokkinum og øðrum starvsfólki, at menna eina matskrá eftir tíðarinnar matsiðum.

Royndir frá tílíkum arbeiði eru ein fyrimunur.

Starvið verður sett frá 15. august.
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Tey, ið vilja hava meira at vita, kunnu seta seg í samband við rektaran, Paula Nielsen, á tlf. 225328, ella við kokkin, Edna Bisp, á tlf. 215207. Teldupostur til rektaran kann sendast til paulini@flsk.fo

Umsóknir við møguligum viðkomandi prógvum og viðmælum skulu sendast Føroya Læraraskúla, við frámerkinum »Umsókn«. Tær skulu vera skúlanum í hendi innan 25. juli.

Tórshavn 26.juni 2003

**Føroya Læraraskúli**
Postrúm 348
Frælsið 20
FO-110 Tórshavn

## Miðvágs-Sandavágs skúli

### Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2003/2004

Starvið verður sett fyri lærara í tíðaravmarkaðum starvi, sum er upptikin á læraraskúla.

Umsøkjarin skal helst kunna yvirtaka tímatalvu uppá 18 tímar í 1.–7. flokk, sum m.a. fevnir um ítrótt gentur, hondarbeiði og undirvísing av næmingi við serligum tørvi.

Starvið verða lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

Fleiri upplýsingar kunnu fáast frá skúlastjóranum, tlf. 332820 ella 332318.

Umsóknir skulu vera Gitte Samuelsen, skúlastýrisformanni, í hendi í seinasta lagi 18. juli 2003.

**Skúlastýrið fyri Miðvágs-Sandavágs skúla**
v/ Gitte Samuelsen
Traðarvegur 32
FO 360 Sandavágur

## Maskinmeistari

Søkt verður eftir maskinmeistara til nýggja virkið hjá P/F Salmon Proteins á Eiði.

**Arbeiðsuppgávur**
At hava ábyrgd fyri dagliga rakstrinum, sum í høvuðsheitum er at ansa eftir dampketli, trýstkókara, reinsiskipan, pumpum og hartil hoyrandi útbúnaði. Viðlíkahald av rakstrartólum.

**Førleikakrøv**
Maskinmeistaraútbúgving. Ketilpassaraprógv er ein fyrimunur. Kunnleika til telduskipanir, serliga skipanir til stýring av rakstrartólum.
Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, kann arbeiða sjálvstøðugt, og er førur fyri at leggja arbeiði til rættis sjálvur.

**Setanartreytir**
Løn og arbeiðstíð sambært avtalu.

**Umsókn**
Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera P/F Salmon Proteins, Postboks 9, 470 Eiði í hendi seinast 17. juli 2003.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jógvan Emil Nielsen á tlf. 423478 ella 210270.

P/F Salmon Proteins er eitt nýtt felag, ið skal savnað saman slógv frá alivinnuni í Føroyum og hagreiða hetta á nýggja virkinum á Eiði.

**Heimarøktin øki 5 Suðuroy**

## Avloysarastarv

Vegna farloyvi verður søkt eftir heilsurøktara ella heilsuhjálpara frá 1. september 2003 til 31. mai 2005, at arbeiða 25 tímar um vikuna í skiftandi vaktum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:
**Økisskrivstovuna**
Jeanna í Lágabø, økisleiðari, tlf. 373907

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:
Heimarøktin, øki 5
900 Vágur

**Umsóknarfreist:** 24. juli 2003

## Hús í Tórshavn

Búgva tygum í einum húsum við einari hædd, sum hava stovu, køk, baðirúm við wc umframt kømur í hæddini? Tað kann saktans vera kjallari ella loft í húsunum.

Um tygum ynskja at búgva í einum størri húsum, hava vit eini hús í trimum hæddum við hjalli og bilhúsi. Kjallarahæddin er ikki innrættað.

Nærri fæst at vita á telefon 317081.